# Nógvar tjóðir umskipa í Nólsoyarfirði

**Herfyri lógu 17 skip í Nólsoyarfirði. Árni Dam sigur, at størsta talið av skipum, ið hevur ligið í Nólsoyarfirði, var í 1991 ella 1992; tá lógu heili 27 skip í senn í fjørðinum!**

UMSKIPING
*Vilmund Jacobsen*

Seinastu tíðina hava nógv stór útlendsk skip ligið í Nólsoyarfirði.

Vit plaga at siga undir einum, at hetta eru russar, men tað er minni enn hálvur sannleiki, tí hesi skip eru úr nógvum ymiskum londum, eitt nú Ruslandi, Panama, Malta, Hollandi og úr Karibiska Havinum.

Skipafelagið Føroya umboðar flestu av hesum skipum, og mánadagin tá ið vit tosaðu við Árna Dam, segði hann, at níggju skip lógu í fjørðinum hendan dagin.

– Men ein dagin beint fyri halguna vóru tey 17 í tali.



## 27 skip

Árni sigur, at størsta talið av skipum, ið hevur ligið í Nólsoyarfirði, var í 1991 ella 1992; tá lógu heili 27 skip í senn í fjørðinum!

Hann sigur, at flestu av hesum skipum eru sonevnd lastaskip og onkur gamal trolari, sum er umbygdur til farmaskip. Eisini hevur ein tangabátur ligið í fjørðinum, sum kom við olju til 5 av skipunum.

Men tað eru ikki øll skipini, sum bunkra á reduni. Nøkur fara til lands at bunkra.

– Herfyri vóru tvey skip inni eftir olju, annað var langafríggjadag og hitt 2. páskadag. Tey tóku 250 tons av olju í part.

## Proviantur

Árni sigur, at umframt olju, keypa skipini, sum liggja í fjørðinum, eisini nógvan proviant. Summi koma til lands eftir provianti, onnur fáa proviantin førdan út á skipið.

Stóru skipini í Nólsoyarfirði umskipa sild og lodnu úr norskum sjógvi og svartkjaft, sum í hesum døgum verður veiddu við Rock All og er á veg norðureftir.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og suðri, um kvøldið minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin fleyr til gul av suðri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnudagin fúskar hann vindin av suðri og møguliga regn. Hitin millum 7 og 11 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷13 |
| Nuuk | ÷4 |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | ÷4 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 11 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 5 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 19 |
| Athen | – |
| Malta | 14 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 4 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 972 hPa. yvir Íslandi grynnist. Eitt annað lágtrýst, 982 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer móti Íslandi og ein lítil hátrýstryggur kemur aftaná og verður yvir Føroyum hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 01/04 kl. 06[00]– 02/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,4°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 01/04 kl. 06[00]– 02/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 2,0 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

28. mars: Fullmáni/Mánin næstur jørðini
4, apríl: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. apr | — | 12.12 | 11.12 | 23.52 | 11.27 | — | 01.45 | 14.12 | 02.45 | 15.12 | 10.27 | 23.07 | 09.27 | 22.07 | 00.00 | 12.27 | 01.00 | 13.27 | 11.57 | — | 00.45 | 13.12 |
| 4. apr | 00.52 | 13.33 | — | 12.33 | 00.07 | 12.48 | 02.52 | 15.33 | 03.52 | 16.33 | 11.48 | — | 10.48 | 23.28 | 01.07 | 13.48 | 02.07 | 14.48 | 00.37 | 13.18 | 01.52 | 14.33 |
| 5. apr | 02.13 | 14.54 | 01.13 | 13.54 | 01.28 | 14.09 | 04.13 | 16.54 | 05.13 | 17.54 | 00.28 | 13.09 | — | 12.09 | 02.28 | 15.09 | 03.28 | 16.09 | 01.58 | 14.39 | 03.13 | 15.54 |
| 6. apr | 03.18 | 15.43 | 02.18 | 14.43 | 02.33 | 14.58 | 05.18 | 17.43 | 06.18 | 18.43 | 01.33 | 13.58 | 00.33 | 12.58 | 03.33 | 15.58 | 04.33 | 16.58 | 03.03 | 15.28 | 04.18 | 16.43 |

5 707265 100036 >